bøkur og bløð

Skótablaðið

Liljan útkomin


Blaðið hjá øllum KFUM- og KFUK skótum í Føroyum er útkomið. Har er ein heilsan tila allar patruljuførarar, guðstænastu grein við teknингum umframt ymiskt annað. Í blaðstjórnini eru: Charlotta Jensen, Sigrun 'Samuelsen, Hugin Eide og Ásbjørn Jacobsen. Adressan hjá skótablaðnum Liljan er "Lildjan" 3815 Leirvík.




Nýtt S.M.H. blað

Nýtt S.M.H. blað er útkomið. Hetta er blað hjá grønu skótunum í Klaksvík. Í blaðnum eru greinar um morsing, legur, kodir o.a. Eisini er áhugavert yvirlit yvir skótarnar í Føroyum í dag, hvussu nógvir skótar eru ymsastaðni í Føroyum. Í blaðnum verður eisini sagt frá, at grønu skótarnir á fundi herfyri valdu eitt foreldraráð og eitt bólkaráð. Formaður í Foreldraráðnum er Grímur Lassen og næstformaður Aksel Zakariasen. Formaður í bólkaráðnum er Bjarni Jacobsen og kassameistari er Hans David Matras.
Í blaðnum er eisini grein um altjóða skótaárið 1982/83. Tað verður hildið í samband við, at tað eru liðin 75 ár, síðani skótarørslan varð stovnað Blaðið skrivar, at tað er at vóna, at Postverk Føroya fer at geva út eitt skótafrímerki í 1982 ella 1983.

Yvirlit yvir føroysku skótaeiningar 31/12- '80







Joen Pauli Joensen skrivar um bygdahandilin

NÝGGJUR MONDUL

Fyrsta nummarið av blaðnum Mondul í ár er útkomið. Har eru fleiri áhugaverdar greinar. Arne Thorseinsson skrivar um Føroya Fornminnissavn og Hoyvík, Mortan Nolsøe skrivar um savning av gátum um Gátu rímu o.a., Jógvan K. Mørkøre hevur grein, sum nevnist, "Okkum nýtist tað vakra", Hetta er røðan, hann helt á Fróðskaparsetrinum fyri FNU. Torben Diklev skrivar grein "Ilska og øska". Hetta er um útgrevstur á Sandi. Jóan Pauli Joensen skrivar síðani eitt sindur um bygdahandilin. Annars er kvøða til vaðbingar, har blaðið fegnast um tiltakið við at varðveita Jóhonnu. Skrivað verður m.a.:"Skirvisáig sær hon út, sum hon stendur, men tað gjørdi Westvard Ho eisini, tá ið hugsjónarmenn tóku sær av henni á sinni, og í dag er hon eitt satt prýði, sum eingin vildi verið fyri utaan, og eitt bæriligt minni um slupptíðina.
Tá ið Westvard Ho og Jóhanna báðar fara at kappsigla, fara vit at kkenna okkum errin av vágbingu m - og takksom ".

Blaðið hevur eisini stutta frásøgn frá ársaðalfundinum í Føroya Forngripafelag, sum varð hildin trimum mánaðum síðani. Har eru prentað nøkur brot úr formansfrágreiðingini, sum eisini kundu verið áhugaverd at trivið í her:

Heiðurslimur Á fundinum varð Sverri 'Dahl kosin til heiðurslim fyri stóra arbeiði hansara fyri fornminni okkara.

Húsini hjá Hans á Lað. Seinasta ár varð farið undir at umvæla tey. Tekjan varð bjálvað og nýtt tróðir lagt á, áðrenn húsini vórðu flutt. Annars umfatáði umvælingin m.a. nýtt viddeyga í syðra skjøldur, bjálvan, nýggjan klædning og teking við flagi. Nýggj dupult hurð við leikindum og klinkum er sett í. Øll hitarørini eru løgd av nýggjum og elánnleggingin er umvæld. Innan eru húsini málað og tapetserað. Enn væntar at gera kjallaran lidnan og laða grót uttan á grundina, men ætlanin er at fáa hesi arbeiði gjørd skjótast. Undir hesum arbeiðnum hevur felagið møtt stórari vælvild, sum tkkað verður hjartaliga fyri. Frá 1. september 1980 hevur Orkuráð leigað húsini.

Húsini á Mýru. Fornminnissavnið er at kalaað líðugt við byggisøguligu kanningarnar av húsunum. Figging er fingin til vega at seta húsini í stand fyri, men tá tað er avmarkað, hvussu nógv lán kan takast, og tað er nakað heilt serligt við hesum húsunum, hevur felagið loyvt sær at skriva til nakrar fyritøkur og felǿgvið bøn um stuðul.